

# Lærlingur til Bilrøkt

**Søkt verður eftir lærlingi til mekaniska verkstað okkara.**

**Førleikakrøv:**
- Góðan røkiskap
- Kundavinarligur
- SIT-útbúgving
- Koyrikort er ein fyrimunur

Fá meira at vita um starvið við at venda tær til tlf. 358888 ella t-post: bilrokt@bilrokt.fo

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 22. juni 2010.

**Bilvask**
Vit vaska bilin innan og uttan

**Verkstaður**
Dekk, oljuskift og umvælingar

**Leigubilar**
Persón- og vøruvognar. Góðir og bíligir

**Flutningshjálp**
Vit flyta bilar, maskinur o.m.a.

BILRØKT SUÐO ANTI-RUST
Borgar fyri góðsku...

Stiðjagøta 3 · Postsmoga 1234
Tlf: 35 88 88 · Fax: 35 88 80
bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo

Sosialurin / KvR 34 18 00

**SkeiðsDepilin** – So fært tú neyðuga førleikan

Skeiðsdepilin arbeiðir við eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúla. Vit vilja geva tær neyðuga førleikan at fremja tey verk, sum tú hevur sett tær fyri.

sd.fo

SkeiðsDepilin | Marknagilsvegur 75 | postboks 3239 | FO–110 Tórshavn | tel 318813 | fax 313374 | info@sd.fo



# Kunningarfundur um Diplomútbúgving í Leiðslu

Diplomútbúgving í Leiðslu byrjar á Skeiðsdeplinum í september 2010, treytað av at undirtøkan er nøktandi.

Í hesum sambandi verður kunnandi fundur mánadagin **21. juni kl. 17.00 á Hotel Hafnia, Parnassi.**

Leiðsla, undirvísarar á útbúgvingini og umboð fyri útbjóðara, sum Skeiðsdepilin samstarvar við, fara at greiða frá útbúgvingini. Lesandi fara eisini at greiða frá sínum royndum.

Diplomútbúgvingin í Leiðslu er ætla verandi og komandi leiðarum. Útbúgvingin setir fokus á tína leiðslu og gevur tær møguleika at menna tínar leiðsluførleikar við at sameina innlit í ástøði og verkligar royndir í leiðslu. Diplomútbúgving í Leiðslu er hægri útbúgving skipað sum parttíðar lestur í 2½ ár. Útbúgvingin er sett saman av 6 obligatoriskum modulum, 3 vallærugreinum og høvuðsuppgávu. Skeiðsdepilin bjóðar útbúgvingina. Nærri kunning um Diplomútbúgvingina í Leiðslu er á heimasíðu okkara, www.skeidsdepilin.fo

# MARKNAÐARSAMSKIPARI TIL VÁGA FLOGHAVN

Vága Floghavn er í einari menningartilgongd. Flogvøllurin og farstøðin verða útbygd komandi 2 árini. Tí søkir Vága Floghavn eftir einum marknaðarsamskipara, sum skal betra um tilboðið til flogfeløg og ferðafólk - og við hesum víðka um inntøkugrundarlagið hjá Vága Floghavn.

Útbyggingin letur upp møguleikar fyri nýggjum ferðamálum og tilboðum til verandi og nýggjar marknaðir og viðskiftafólk, sum nýggi marknaðarsamskiparin skal troyta best møguligt.

Marknaðarsamskiparin skal hava ábyrgdina av at menna tænastu útboðini hjá floghavnini, menna atgongdina til verandi og nýggjar marknaðir, skipa fyri søluátøkum og luttaka í handilsligu menningini av nýggju farstøðini, eins og luttaka í øðrum uppgávum í sambandi við virksemið hjá floghavnini.

Marknaðarsamskiparin skal hava útbúgving, so sum cand merc, HD, ella aðra hóskandi útbúgvin, góð samstarvsevni og duga at arbeiða sjálvstøðugt, royndir frá privata ella almenna arbeiðsmarknaðinum innan marknaðarføring og kunnleika til føroyskt, danskt og enskt mál.

Marknaðarsamskiparin kemur í virki sínum at samstarva við avvarandi starvsfólk hjá Vága Floghavn eins og uttanhýsis ráðgevar og samstarvsfelagar.

Miðað verður ímóti at seta starvið 1. august 2010, ella eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dávid Reinert Hansen ella Regin I. Jakobsen á telefon 354400 ella teldupost: drh@floghavn.fo

Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 23. juni 2010. Allar umsóknir við neyðugum fylgiskjølum verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til: Dávid Reinert Hansen, teldupost: drh@floghavn.fo

www.floghavn.fo

FAE VÁGA FLOGHAVN

sansir.fo